# Einki hefti fyri teimum úr Miðvági

**5-MANNAFØR GENTUR** Eftir at tær komu fyri seg í triðja FM róðrinum, hevur eingin av hinum havt møguleika at hótta Beintu

Tróndur Arge

Tað var ikki fyrr enn í triðja FM róðrinum á Eystanstevnu, at genturnar úr Miðvági umborð á Beintu løgdu seg út í FM kappingina. Á Norðoyastevnu og á Sundalagsstevnu vóru tær nummar trý. Á Skálafjørðinum vunnu tær, og síðani hefti einki fyri teimum, og soleiðis var tað eisini á Ólavsøku.

Ørnin úr Sandavági fekk besta startin, og eina løtu totaðust vágabátarnir báðir – Beinta og Ørnin – um fremsta plássið, meðan Falkur, ið hevði møguleika at vinna FM, ikki fekk so góðan start.

Meðan Beinta streyk frá hinum, so gjørdist kappingin um næstfremsta plássið sera tøtt. Ta kappingina vann Falkur, meðan Ørnin endaði á triðja plássi.




*Glaðar gentur umborð á Beintu eftir sigurin á ólavsøku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

| | |
|---|---|
| 1 Beinta | 04:54.16 |
| 2 Falkur | 04:56.12 |
| 3 Ørnin | 04:57.11 |
| 4 Sílið | 04:57.19 |
| 5 Tjaldrið | 05:05.03 |
| 6 Silja | 05:06.14 |
| 7 Tambar | 05:09.12 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Beinta (FM vinnari) | 45 |
| 2 Falkur | 42 |
| 3 Sílið | 32 |
| 4 Ørnin | 27 |
| 5 Tjaldrið | 24 |
| 6 Silja | 14 |
| 7 Tambar | 9 |
| 8 Fípan Fagra | 2 |

# Metini hildu frá á Ólavsøku

**KAPPRÓÐUR** Góðu líkindini mundu eiga sín part av orsøkini til, at tað var so langt í frá, at nakað met varð sett í kappróðrinum á Ólavsøku

Tróndur Arge

Tað var sonn fragd at vera til kappróður ólavsøkuaftan. Veðrið var av tí fagrasta. Lýkka var í luftini, tað var turt, sólin sá, og tað var mest sum stilli.

At tað var stilli bar við sær, at sjógvurin var sum ein sveiti, og tað var ivaleyst orsøkin til, at tað í ongum róðri eydnaðist at koma í nánd av tíðarmetunum. Tey serkønu siga, at bestu fyritreytirnar at røkka metum eru, tá ið tað er undanvindur, og tá ið alda og gjálv ikki órógva.

Sjálvsagt eru kappingarhugað ítróttarfólk altíð áhugað í at seta met. Men tað er neyvan nakar ivi um, at kapprógvarar eru sera fegin um, at líkindini hesa ferð vóru so góð, sum tey vóru. So gerst tað ikki við, at metini mugu bíða til eina aðra ferð!

Næst við at koma í nánd av meti var Páll Fangi, sum var 6.19 sekund frá bestu tíðini. Metið eigur Tvørabáturin, sum við 4.12.06 á Ólavsøku í fjør róði stutta teinin skjótari enn nakað 6-mannafar við monnum nakratíð áður hevur megnað teir 900 metrarnar. Tíðin hjá Páll Fanga var fjórði besta vinnaratíðin hjá 6-mannaførum við monnum á Ólavsøku.

Í tveimum førum vóru tað meiri enn tjúgu sekund frá bestu vinnaratíðini. Dreingirnir á Bliki vunnu við 23.12 sekund lakari vinnaratíð, enn besta tíðin, sum er tann hjá Súluni í 1994 – 4.14.68, og kvinnurnar á Sølmundi vunnu við 21.13 sekund lakari vinnaratíð, enn besta tíðin, sum er tann hjá Jarnbardi í 1995 – 4.21.12.

Hóast tað ikki verður tosað so nógv um tað, so verður á hvørjum ári við spenningi fokuserað á óføru tíðina hjá Skálabátinum í 1992 – 3.52.00. Átjan ára gamla mettíðin í kappingini millum 10-mannaførini fer at halda í hvussu so er eitt ár aftrat. Vinnaratíðin hjá Vestmenningi var 11.24 sekund lakari enn tíðin hjá skálamonnum í 1992.

Í kappingini millum 8-mannaførini eigur Ørvur framvegis metið, sum varð sett fyri ellivu árum síðani – 4.03.21. Tíðin hjá Argjabátinum í fyrradagin var 11.24 sekund lakari.

Kvinnurnar á Erlu Kongsdóttir róðu einsamallar móti málinum. Men tær tóku ikki metið, sum Aldan setti í 1981. Tíðin hjá Alduni – 4.38.40 – var 12.12 sekund betri enn vinnaratíðin hesa ferð.

Gentukappingin millum 5-mannaførini er bara seks ára gomul. Hesa ferð var vinnaratíðin hjá Beintu 25 sekund lakari enn tíðin hjá Drekanum í 2008 – 4.29.24. Kortini var vinnaratíðin hjá Beintu tann triði besta nakrantíð.

*trondur@sosialurin.fo*

# Vertirnir fóru við gullinum

**BARNARÓÐUR** Bæði í gentukappingini og dreingjakappingini vóru tað bátar hjá Havnar Róðrarfelag, sum vunnu á Ólavsøku og FM

Tróndur Arge

Kappingarárið hevur ikki hilnast væl hjá Havnar Róðrarfelag. Men í barnakappingini hevur hilnast so væl, sum tað ber til, tí bæði í kappingini millum dreingir og gentur vunnu bátar hjá felagnum FM, og í hesum kappingunum var tað sjálvandi eyka søtur biti, at tað eisini eydnaðist at vinna á Ólavsøku.

Títlingur var fremstur í dreingjakappingini, har tað aftur hesa ferð var í tættari kapping við Havfrúnna, og Drekin var fremstur í gentukappingini. Hesa ferð var tað í kapping við spógvan, meðan FM silvurvinnararnir umborð á Teistanum endaðu á triðja plássi.

**Dreingir**

| | |
|---|---|
| 1 Títlingur | 02:33.19 |
| 2 Havfrúgvin | 02:34.14 |
| 3 Drekin | 02:36.14 |
| 4 Teistin | 02:37.10 |
| 5 Sandingur | 02:39.15 |
| 6 Tambar | 02:39.20 |
| 7 Royndin Fríða | 02:40.20 |
| 8 Jallurin | 02:41.04 |
| 9 Frúgvin | 02:47.10 |
| 10 Heykur | 02:47.12 |
| 11 Hulda | 02:54.05 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| Títlingur (FM vinnari) | 47 |
| Havfrúgvin | 42 |
| Drekin | 37 |
| Teistin | 25 |
| Jallurin | 18 |
| Royndin Fríða | 13 |
| Sandingur | 9 |
| Tambar | 5 |
| Junkarin | 1 |

**Gentur**

| | |
|---|---|
| 1 Drekin | 02:32.16 |
| 2 Spógvin | 02:34.23 |
| 3 Teistin | 02:35.21 |
| 4 Beinta | 02:36.00 |
| 5 Fípan Fagra | 02:39.07 |
| 6 Ørnin | 02:39.15 |
| 7 Jallurin | 02:40.08 |
| 8 Firvaldur | 02:41.23 |
| 9 Svanur | 02:43.03 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Drekin (FM vinnari) | 44 |
| 2 Teistin | 43 |
| 3 Spógvin | 34 |
| 4 Fípan Fagra | 26 |
| 5 Beinta | 19 |
| 6 Ørnin | 16 |
| 7 Jallurin | 12 |
| 8 Tambar | 1 |
| 9 Firvaldur | 1 |